*Føroyar sum komandi oljutjóð!*

# 80 føroyingar á olju-messu í Aberdeen

*Í dag verður stóra altjóða oljuframsýningin og -ráðstevnan "Offshore Europe 95" sett í Aberdeen í Skotlandi. Hetta er fyrstu ferð, at føroyingar luttaka á oljuframsýning við egnum bási. Ikki færri enn 30 virki og stovnar sýna fram á føroyska básinum*




Tað eru fýra ár síðani, at tað í yvirskriftunum í føroyskum bløðum stóð at lesa, at 60 føroyingar vóru við á altjóða oljumessuni í Aberdeen.



*Bumerki frá føroysku luttakarunum*

Hesaferð er talið kanska eini 80 fólk, men broytingin er tann, at føroyingar nú eru við á framsýningini við sínum egna bási.

Umleið 30 virki og stovnar skulu umboða Føroyar undir felagsheitinum "North Atlantic Resource Centre".

Talan er her um skipasmiðjur, telduvirki, skúlar, oljufyrisiting og mangt annað.

Tað er Menningarstovan, sum samskipar føroyska uttakið, sum má sigast at vera eindømi í føroyskari søgu.

Hóast eingin olja enn er funnin á føroyskum øki, so bendir nógv á, at olja er í undirgrundini. Áhugin millum oljufeløg at fara undir at leita við Føroyar er framvegis stórur og hetta er sjálvandi medvirkandi til, at so mong føroysk virki og stovnar nú fara at vísa flaggið á eini framsýning og ráðstevnu, har flestu av virkjunum í Europa, sum hava nakað við oljuvinnu at gera, eru við.

At áhugin fyri økinum vestan fyri Føroyar í løtuni er so nógv í fokus í eitt nú Bretlandi ger føroysku luttøkuna so mikið meira áhugaverda. Oljumessan endar fríggjadagin.

jan






*Básurin varð herfyri sýndur fram í Havn. Tað er Team 85, sum stendur fyri uppseting og tilfari. mynd kalmar*




## Føroysku luttakararnir á Offshore Europe '95

**Skipasmiðj og Skipsmekkaravirki:**
Faroe Service Centre,
Skipafelagið Føroyar

**Reingerðingarevni Reingerðingarútgerð:**
Kemilux Ltd

**Útgerð:**
Oilwind, J. K. Joensen & Sonur
El-Service Ltd /Radioservice

**Navigationsútgerð:**
Radioservice Ltd

**Tólbúnaður.**
Ritbúnaður o.a. innan EDV
Datronik Ltd
Formula Xerox
Elektron Ltd
Com-Data Ltd
Sam-teld Ltd
Telefonverk Føroya Løgtings

**Útbúgving:**
Føroya Handilsskúli
Føroya Sjómansskúli
Føroya Maskinskúli
Tekniski Skúlin

**Ráðgevandi verkfrøðingar:**
ED-Verkfrøði Ltd

**Felagsskapur innan oljuvinnu:**
Føroya Oljuídnaður
Fuglafjord Service Companies
Kári Johannesen, Maskinverkstaður Ltd
JT-EL

**El-innleggjarar:**
Leif Mohr Ltd
Sofus M. Jakobsen Ltd

**Shipping v.m.:**
Tor Shipping Ltd

**Matvørur:**
Miklagarður

**Flogfelag:**
Atlantic Airways Ltd

**Floghavn:**
Vágar Airport

**Heilsøla við matvørum o.o.:**
Poul Hansen Ltd

**Ferðaflutningur og umboðan:**
Smyril Line Ltd

**Ferðaflutningur og annar flutningur:**
Strandfaraskip Landsins

**Skipasmiðj v.m.:**
Tórshavnar Skipasmiðja Ltd

Jarðfrøðissavnið

Oljufyrisitingin
Oljuráðleggingarnevndin

**Samskipari:**
Menningarstovan